Til Almanna- og Mentamálaráðið

Eirðargarður 2, FO-110 Tórshavn

ammr@ammr.fo

Viðmerkingar til Lógaruppskot til hoyringar til løgtingslóg um Brekumboð.

Sosialráðgevarafelag Føroya fegnast um, at slíkt lógaruppskot verður sett fram, ið ger at vit tillaga okkum Altjóða mannarættindasáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

Felagið tekur undir við lógartekstinum, soleiðis hann er orðaður og hevur bert hesar smávegis viðmerkingar.

Í §8 og viðmerkingunum til greinina verður m.a. sagt, at almannaøkið skal tilnevna 4 skikkaði umboð, sum skulu hava ein breiðan kunnleika til teirra økið, eins og viðurskifti sum eru viðkomandi fyri fólk, ið bera brek.

Sosialráðgevarfelagið skal tí vísa á nakrar av kjarnuførleikunum hjá okkara limum:

Heildarsýnið, okkara amboð, gevur okkum eina breiða mynd av støðuni og avbjóðingunum hjá tí einstaka. Sosialráðgevar eru serfrøðingar í breiddini og vit byggja okkara vitan á fýra fakøkir, sum eru: sosialt arbeiði, sálarfrøði, samfelagsfrøði og løgfrøði.

Fýra grundprinsippir eru í sosialráðgevarafakinum:
HEKS - Heildarsýn, Etikkur, Kommunikatión og Systematikkur.

Sum sosialráðgevar hava vit førleikan og fakkunnleikan at síggja borgaran sum part av eini heild og at skilja støðuna í fleiri stigum; mikro, meso, makroniveau.

Ásannandi, at sosialráðgevarar hava breiðan kunnleika til samfelagsviðurskifti og neyðuga fakliga førleikan fer Sosialráðgevarafelagið tí at heita á tykkum um at nágreina grein 8 og viðmerkingarnar til greinina, soleiðis at tað verður positivt tilskilað, at umboðini eru sosialráðgevarar.

Vegna Sosialráðgevarfelag Føroya

Borgný Mohr, forkvinna

Hallbjørg Lamhauge, næstforkvinna og kassameistari

Petra Joensen, skrivari